# Miðvikan

Framhald frá síðu 33




*Kirstin Jacobsen takkar saman við Maju og Karl Johann Birgissyni Jón Úlfarson fyri hansara luttøku á ógloymandi ferðini til Vattarnes*



*Úr fjøruni á Vattarnesi á sumri 1941. Kristin Sørensen umborð á Skrápinum, bátinum hjá Edvard Hansen úr Lorvík. Hvør man Kristin vera?*



*Vattarnes í 1925*

## Farvæl til Vattarnes

Útróðrarmenn úr Føroyum dugdu ikki at hugsa sær til, at teir sluppu ikki til Íslands at rógva út, tá ið Ísland loysti frá Danmark í 1944. Teir valdu sær eina nevnd at fara til Íslands at samráðast við tað nýggja yvirvaldið í Íslandi at fáa eina sáttmála í lag við íslendingar. Millum sendimenninar var Jóan Petur Eliasen. Hann hevði so ofta verið talsmaður hjá føroyingum. Honum høvdu teir álit á. Hann var ansin og vitugur maður, sum ikki leyp framav.

Men einki kom burturúr hjá teimum. Gamli útróðrarformaðurin úr Lorvík var ikki sørt vónsvikin. Hann hevi væntað sær frægari sømdir av teimum, sum hann helt vera vinir sínar. Men á Vattarnesi átti hann hóast alt vinir, tí ein kvinna í bygdini bjóðaði honum heim til sín at vera, meðan hann bíðaði eftir at sleppa heim.

Eina ferð sá gamli útróðrarformaðurin nesið aftur. Hetta var í august 1945. Hetta var seinasta ár føroyingar róðu út á Vattarnesi. Jóan Petur var ikki við ta ferðina. Synir hansara høvdu keypt bátin Viðanes, og teir royndu á Eysturlandinum, og har var gamli við. Ein dagin teir fara inn á Eskifjørðin, sigla teir framvið einum skipi, sum liggur har og keypir fisk á Vattarnesleiðini.

Jóan Petur hyggur uppá land og sær øll støðini, sum vóru so kend hjá honum. Hann kennir eisini menninar umborð á skipinum. Hann heilsar »Góðan dag, góðan dag!« Menn veittra og eina løtu brosa gamlir kenningar til hvønn annan. Viðanes heldur fram sína leið. Jóan Petur heldur í vantið og veittrar. »Farvæl,« rópar hann. Tað var seinasta heilsan hjá tí gamla manninum til gomlu summarstøð sína og fólkið har.

Eitt pussugt samband varð tó við Vattarnes í 1979. Tá misti tann umrøddi Edvard ein boyu á útróðri. Hon var funnin aftur á Vattarnesi.

Nógvir av lorvíkingunum fingu eisini síni íslendsku kelinøvn heim við sær aftur til Lorvíkar, har tey vórðu brúkt.

Tað skal skoytast uppí her, at á Bakkafjørðinum varð ikki kvett á stokkinum sum á Vattarnesi við føroyska útróðrinum. Har hildu teir á fram til 1949.

## Jóan Jakku á Gerðismørk var eisini á Vattarnesi

Ein av teimum mongu lorvíkingunum á Vattarnesi var Jóan Jakku Jacobsen á Gerðismørk. Hann mintist Jón eisini væl. Jón minnist hann serliga av ti, at hann ofta las í Bíbliuni. Jóan Jakku var virkin missiónsmaður.

Hann var fyrstu ferð til lands á Vattarnesi í 1912, tá hann var 16 ára gamal. Tað var tá trupult at ferðast, men við lagaligheit varð lætt nógv um. Teir fóru til Íslands við Floru hjá Bergenske Dampskibsselskab. Teir vóru so lagaligir, at teir tóku lorvíkingarnar umborð í Lorvíksfirði. Teir vórðu eisini settir á land á Vattarnesi heldur enn á Fáskrúðsfirði, sum vildi verið meira óhøgligt. Ferðaseðlaprísurin var tá kr. 12 fyri mannin og 20 kr. fyri bátin.

Jóan Jakku greiðir frá eini serligari hending í 1915, tá útróðrarmenn vóru á veg heim við Vesta. Fyrri heimsbardagi var tá, og skipið varð tikið av bretskum verjuskipi. Fyrst var tað inn til Onglands. Síðan komu teir til Danmarkar við øllum fólkinum. Heimafólkið var við at gerast bangið um útróðrarmenninar, men teir komu so heim í øllum góðum. Jóan Jakku var ikki sjálvur við á teirri ferðini. Hann var ein av teimum, sum vóru eftir hjá fiskinum, og teir komu heim nakað samstundis sum hinir.

Tey seinnu árini lakasaltaðu teir nógv av fiskinum. Teir gjørdu sær stórar kassar, sum mundu taka um fimm skippund at lakasalta í. Tað fór nógv minni av salti til lakasaltaðan fisk.

Teir turkaðu eisini nakað av fiskinum. Tað var nógv arbeiði av hesum, men prísurin var nógv betri.

Teir høvdu altíð nýggjar bátar við sær til Íslands. Íslendingar vildu fegnir keypa bátarnar frá føroyingunum. Teir fingu eisini nýggjar bátar smíðaðar í Føroyum. Jóan Petur Eliasen róði út á Vattarnesi í 37 ár. Hann hevði hesi árini 57 bátar við til Íslands. Fyrst og fremst til sín sjálvs, men eisini bátar, hann lat smíða fyri íslendingar. Teir flestu vóru smíðaðir í Lorvík.

Tað var trongligt at búgva. Eitt árið vóru teir 13 mans i felag. Tá svóvu 11 mans í einari song!

Kosturin var yvirhøvur vánaligur. Menn høvdu tó onkran mat við sær sum skerpikjøt. Men tað góða var, at teir fingu nógvan fugl. Beint uttanfyri Vattarnes er ein lítil oyggj, Skrúður. Her er nógvur fuglur, bæði lundi og lomvigi. Bøndurnir, sum áttu oynna, góvu teimum loyvi til at fara út á hana at fáa sær fugl. Teir, sum komu tíðliga, fingu eisini egg.

Lendingin á Vattarnesi var so sum so. Á fjøru var langt at bera fiskin niðan í kjallaran. Tað var hált at ganga við fiskabøruni, sum kundi taka 220 pund. Var tað flóð, tá teir komu í land, var vegurin niðan í kjallaran sjálvsagt stytri. Tey seinnu árini høvdu íslendingar, sum róðu út har, gjørt sær træbrúgvar út í sjógvin. Hesar kundu føroyingarnir eisini brúka. Hetta lætti nógv um.

Íslendingarnir vóru ymsa staðni frá. Teir sum vóru úr Grindavík høvdu tann sið, at tá báturin var leysur av landi, stungu teir árarnar undir bekkin. Tað sá tá út, sum at teir signaðu seg, áðrenn teir fóru til árarnar.

Selma Kristiansen, dóttir Jóan Jakku, greiðir frá, at pápanum dámdi so væl á Vattarnesi, at hann hevði hug til at búseta seg har. Men konan segði nei.

Hon minnist eisini, hvussu stuttligt tað var at fáa pápan heim aftur. Tá hevði hann ber, kandisukur og kummankringlur við sær. Hetta var forkunnugt hjá børnum í Føroyum.

Jóannes Johannesen, kallaður Lorvíks Jóannes, sum hevði verið nøkur summur á Vattarnesi, keypti sær ein bóndagarð har á leiðini og ætlaði at flyta yvir. Menn hann seldi so garðin aftur.

**Komandi partur**
fer at snúgva seg um føroyska fiskivinnusøgu á Norðfjørðinum